LESARABRØV / VIÐMERKINGAR

# Argir en forstad



**Henning Christensen**
valevni til býráðsvalið í Havn

Næsten fire år er gået siden, at Argir ophørte, som en selv-stændig kommune, og blev en part af Torshavn kommune fra 1. januar 1997. Argir er nu en forstad til Torshavn.

Ved sidste kommunevalg havde de fleste argjafolk forventet, at en eller flere fra Argir blev valgt ind i Torshavn byråd.

Desværre fik argjafolk ikke nogen valgt i byrådet, og dermed heller ikke no-gen direkte indflydelse på byrådsar-bejdet vedrørende forhold, som måtte være i den nu nedlagte Argja kommune.

I Dimmalætting 19. oktober er en artikel med et forhenværende byrådsmedlem i det daværende Argja kommune. Han giver blandt andet udtryk for hans opfattelse af hvordan opstillin-gen til kommunevalg burde være. Endvidere påpeger han det uheldige i, at Argir ikki har fået en lokal valgt ind i Torshavn byråd.

Vi er nok flere, som kan tage under ved dette syns-punkt.

Muligheden for, at få valgt folk på Argir ind i Tors-havn byråd til kommune-valget 21. nov. er til stede. Den 31.12.1999 havde 1.061 folk på Argir valgret – nok til at få valgt 2-3 ind i det kommende by-råd om argjafolk vil dette.

Som valgemne til byrådsvalget i Torshavn kommune vil undertegnede – hvis dette bliver muligt arbejde for, at Argir og folket, som her bor, ikke bliver glemt i det kommende byrådsarbejde.

I en tidligere artikel har jeg skrevet angående forholdene vedrørende bådehavnen på Argir. Flere af vejene og fortovene er i en tilstand, som grænser til det uforsvarlige. Trafikken til og fra Argir er nu så stor, særligt om morgenen og aftenen, at der må findes en måde, at regulere færdslen på hurtigst muligt.

Det må være selvsagt, at Argir som forstad får tildelt en part af den fremtidige opførelse af børnehaver/vuggestuer, ældre og ungdomsboliger – en sportshal, samt en forbedring af de nuværende forhold hvorunder skolen fungerer.

# Skil má fáast á parkerings-viðurskiftinum

**John Sigurd Joensen**
Valevni á Javnaðarlistanum í Klaksvík

Á fleiri vegastrekkjum er onki skil á parkeringini. Nevnast kann: Víkavegurin, undir Fossum, undir Brúnni og fleiri aðra staðir í býnum. Har má skil fáast á. Bilar standa sum best ber til, tað mátti ikki verið so ringt at fingið parkeringsviðurskiftini í rættlag um viljin var til staðar.

### Gongubreytir

Nógva staðir í býnum mugu fótgangarnir ganga á vegnum. Stórir mangul er á gongubreytum. Hetta mugu vit fáa í rættlag so fótgangarin kann føla seg tryggan tá tey fara út. Gott val.

# Tekniski skúlin aftur hóttur



**Leivur Hansen**
borgarstjóri

Enn eina ferð sær ikki mætari út enn, at landsins myndugleikar aftur eru í ferð við at máa støðið undan Tekniska Skúlanum í Havn.

Hetta hóast lærlingatilgongdin er støðugt vaksandi (takkað veri økta virkseminum innan handverksvinnuna), og brúk sostatt er fyri skúlanum nú meira enn nakrantíð.

Men trongu fíggjarkarmarnir, sum Undirvísingar- og Mentamálastýrið hevur kroyst oman yvir skúlan næsta ár, taka snøgt sagt grundarlagið undan honum.

Munurin millum uppskot skúlans til fíggjarætlan fyri 2001 og tað, sum UMMS hevur álagt skúlanum at halda seg innan fyri, er slakar fimm miljónir krónur.

Leiðsla skúlans hevur gjørt myndugleikunum greitt, at verður hetta úrslitið, fær tað sera álvarsamar avleiðingar fyri undirvísingarvirksemið á skúlanum.

Krøvini til vinnuskúlar gerast alt størri, og fær Tekniski Skúlin ikki tær sømdir, ið neyðugar eru fyri at kunna lúka hesi krøv, ja, so fær hann heilt einfalt ikki virkað sum ein vinnuskúli.

Soleiðis, sum skúlin hevur verið viðfarin av myndugleikunum gjøgnum árini, kann ein ikki annað enn freistast til at fáa illgruna um, at hetta er liður í eini miðvísari herferð ímóti skúlanum við tí endamáli fyrr ella seinni at taka hann av!

Tingið viðger í løtuni uppskotið til løgtingsfíggjarlóg fyri næsta ár, har landskassastuðulin til Tekniska Skúlan er settur til 14,3 milj. kr., meðan tørvurin hjá skúlanum er 19,1 milj. kr.

Undirritaði fer í hesum sambandi at loyva sær at heita á allar tingmenn, ikki minst teir úr Suðurstreymi, um at reisa uggafjaðrarnar í hesum máli og koma Tekniska Skúlanum til hjálpar, so hann fær ta neyðugu játtanina at virka undir næsta ár.

Fær hann ikki tað, verður avleiðingin sambært leiðslu skúlans m.a., at nýggir lærlingar ikki sleppa í læru fyrrenn um tvey ár, og at teir, ið hava gjørt sáttmála eftir 1. august í ár, ikki sleppa í skúla fyrrenn um tvey ár.

Umframt at neyðugt verður at leggja deildir niður við teimum harav standandi avleiðingum fyri viðkomandi vinnugreinar.

Hetta verður ein dyggur smeitur fyri handverksvinnuna, ið eftir sváru kreppuárini nú so smátt er um at koma fyri seg aftur.

Støðan er við øðrum orðum sera hættislig, og vónandi leggja tingmenn sær hetta bæði væl og virðiliga í geyma í sambandi við víðari viðgerðina av fíggjarlógaruppskotinum fyri næsta ár.

# Foreldraløn – Barnaansing



**Johan Mortensen,**
valevni fyri Tjóðveldisflokkin til býráðið

Tað er ein sera stór upphædd sum Býráðið hevur sett av til barnaansing og tað er rættuliga tankavekjandi at tørvurin kortini ikki verður nøktaður. Ongin ivi er um, at øll barnaansingin eigur at verða endurskoðað. Eg eri sannførdir um., at alt ov nógvar dupultfunktiónir og órationellar loysnir eru nógva staðni.

Tey bestu at ansa eftir sínum børnum eru foreldrini og tað er ongin ivi um, at frægasta loysnin, ella valmøgulleikin, er hon, at Býráðið letur eina munandi upphædd sum ger tað møguligt at annað av foreldrunum er heima hjá barninum/børnunum. Vit skulu ikki lata bureakrati ella smásinni forða slíkum ætlanum um foreldragjald.

Ein gongd leið er sjálvandi eisini at størri arbeiðspláss útvega sær barnagarðar, men eri eg bangin fyri at ein í slíkum føri kann koma gera at gera mun á fólki at og at tey virkini sum eru betur fyri fíggjarliga koma at hava betur sømdir enn onnur td., virkir innan fiskivinnuna.

Eg haldi at tað yvirhøvur er so mannminkandi og ósømuligt at barnaansingin ídag í Føroya Høvuðsstaði er ein so stórur trupulleiki og sum kanska ger at ung fólk aftra seg við at fáa børn.

Tórshavn fer at vaksa sera nógv í komandi árum og verður tørvurin fyri ansing at vaksa almikið.

Tjóðveldisflokkurin skal loysa hetta álvarsmál til fulnar.

# Vælkomin inn á Nes

**Súni í Hjøllum,**
bygdaráðslimur

Undirritaði fer enn einaferð at gera vart við, at vegirnir úti á Nesi, sum eru landsvegir, eru sera vandafullir — í ávísum førum deyðsfellur. Eingin við ábyrgd kann lata hetta sita á sær.

Sum umboð fyri Nes kommunu hava vit á óteljandi fundum og við óteljandi skrivum til Landsverkfrøðingin gjørt vart við støðuna, men tað hendir einki, tí onnur arbeiði verða raðfest hægri.

Í løtuni arbeiðir fíggarnevnd løgtingsins við løgtingsfíggjarlógini fyri 2001, og tí fer undirritaði at heita á limirnar í fíggjarnevndini um at seta pening av til nevnda endamál.

Fíggjarnevndarlimirnir eru eisini vælkomnir inn á Nes at kunna seg við umstøðurnar!

## Fyrilestur um Føroyingasøgu

*Tíðindaskriv*

Leygardagin 28. oktober kl. 15.00 heldur Óluva Klettskarð, lærari í søgu og føroyskum á Føroya Studentaskúla og HF-skeiði, almennan fyrilestur um Føroyingasøgu í søguligum og bókmentaligum ljósi. Fyrilesturin verður í Loftsstovu á Føroyamálsdeildini á Debesartrøð.

Føroyingasøga er eitt høvuðsverk í bókmentum okkara. Hon viðger tíðina um ár 1000, men serfrøðingar eru misjavnir á máli, um hon skal metast sum søgulig kelda ella sum skaldskapur.

Fleiri rithøvundar hava gjøgnum tíðina brúkt tilfar úr Føroyingasøgu í verkum sínum. Sjóvarbøndurnir yrktu kvæði við evnum úr Føroyingasøgu, Mikkjal á Ryggi yrkti Brestiskvæði, og skaldabrøðurnir Janus og Hans Andrias Djurhuus yrktu við evnum úr Føroyingasøgu, Janus eitt nú Gandkvæði Tróndar, og Hans Andrias eitt nú Deyðastund Tróndar. Jeffrei Henriksen hevur yrkt Bjarnabana, og mong onnur dømi kundu verið nevnd. Hesi dømi benda á, at Føroyingasøga hevur havt – og framvegis hevur – stóran týdning fyri føroyskan samleika.

At viðgera Føroyingasøgu úr bókmentaligum og søguligum sjónarhorni, er tí áhugavert og viðkomandi, ikki minst hjá teimum, sum í dag undirvísa í søgu og føroyskum.

Tað er Móðurmálslærarafelag Føroya, sum skipar fyri fyrilestrinum.



LESARABRØV / VIÐMERKINGAR

# Oljuvinnan krevur bústaðarpolitikk



**Elin Lindenskov**
býráðslimur, valevni Javnaðarfloksins
www.lindenskov.com

Nú oljuvinnan er við at taka dik á seg í Føroyum, kunnu vit vænta, at fleiri fólk í styttri ella longri tíðarskeið fara at búseta seg i Føroym. Spurningurin, hvar hesi fólkini ynskja at búgva er greiður. Tey vilja búgva í miðstaðarøkinum. Tí kunnu vit uttan iva vænta, at fólkatalið í miðstaðarøkinum og serstakliga Havnini fer at vaksa enn ógvusligari enn nú.

Okkurt oljufelag hevur longu tosað um, at teirra felag kemur at brúka eini 15 útlendsk starvsfólk. Hesir tilflytarnir hava sínar familjur við til Føroyar, so tað talið kann lættliga gerast nógv hægri. Hetta er bert byrjanin. Vit eiga tí at seta okkum spurningin, hvussu so verður, um vit finna olju.
Ein so stór tilflyting krevur ein skipaðan bústaðarpolitikk. Vit eiga at seta okkum spurningin, um vit framhaldandi skulu byggja hvør sítt hús og harvið lata tað upp til hvønn einstakan at finna sær bústað, ella vit vilja skipa ein bústaðarpolitikk, har pláss og møguleikar eru hjá øllum. Um vit velja at lata standa til, so kunnu vit vænta, at bæði leigu- og húsaprísirnir fara at hækka enn meira.

Tá verða tað tey háløntu, sum hava møguleika at útvega sær bústaðir, meðan vanliga fólkið má taka við tí, sum einaferð verður eftir, ella tað, sum tey eru før fyri at gjalda.

Tað fyrsta, vit kunna gera, er at fáa eina leigulóg, eina lóg ,sum ásetir krøv til bæði leigaran og eigaran. Krøv um, hvussu ein íbúð skal vera, kostnað, leigusáttmálar o.s.fr. Vit eiga at gera tað møguligt at byggja og reka leiguíbúðir.Vit mugu skapa møguleikar soleiðis, at vit veruliga kunna velja,
hvussu vit skulu búseta okkum, vit mugu burturúr okkara siðbundna hugburði, at hvør einstakur sjálvur skal verða bundin av at byggja síni hús og harvið binda seg fíggjarliga restina av lívinum. Hetta er ein av fortreytunum fyri, at vit kunnu hava eitt livandi miðstaðarøki.

TÍÐINDI

# Forboðið at selja bilar við almennan veg



*Tað er IKKI loyvt privatfólki, at seta bil sín til sølu við almennan veg, um tey ikki eiga stykki sjálvi. Ikki er óvanligt, at nógvir bilar standa á hesum øki við Hvítanesvegin, men tað kostar eina bót upp á 3-400 krónur (Mynd: Portal.fo)*

**Fleiri privatfólk hava seinastu tíðina fingið bót fyri at seta bil sín til sølu við almennan veg. Tað er, sambært politiviðtøkunum, ikki loyvt**

Ikki munnu teir bilarnir vera so fáir, sum hava staðið til sølu við Hvítanesvegin í Havn. Beint niðanfyri hjá Skógrøktini, er eitt stórt øki, sum eingin brúkar, og tí hava nógv privatfólk nýtt høvi til at seta bilin, sum er til sølu, har.

Men hetta er ikki nakað, sum hóvar løgregluni, tí tað er ikki loyvt. Av støðini í Havn sigur vakthavandi, at løgreglan hevur givið nógvum bøtur, sum hava havt bilar sínar standandi á økinum niðanfyri Skógrøktina.

- Grein 35 í politiviðtøkunum sigur, at tað er ikki loyvt at seta privatar lutir til sølu á almennum øki. So einfalt er tað, og tí fáa tey bót, sigur vakthavandi.

- Stendur hann á privatum øki, so er einki sum forðar fyri, at skelt verður sett í bilin, um at hann er til sølu, men ikki á almennum, leggur vakthavandi afturat.

Vakthavandi sigur, at bótin plagar at vera 3 til 400 krónur.


1000

orsøkir at ferðast við MAERSK AIR



**1000 kr. av vanliga APEX-prísinum**

Frá 23. oktober til og við 10. desember 2000 ber til at ferðast bíliga til og úr Føroyum. Forsølan er frá 16. oktober til 3. desember 2000. Treytin er at tvey ferðast saman. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Danmark**
**(Keypmannahavn ella Billund)**
**ella**
**Danmark - Føroyar**
**og aftur 1)**

Fyri hvønn
**1500,-**
+ ferðaavgjøld

**Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%**

*1) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðatíðarskeiðið skal fara um leygardag og sunnudag. Ferðin kann í mesta lagi vara 1 mánað. Minst tvey skulu ferðast saman. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.*

**Haldið jól í Danmark við MAERSK AIR**

Frá 8. desember 2000 til og við 7. januar 2001 ber til at ferðast bíliga til Danmarkar og aftur. Forsølan er frá 1. november til 11. desember 2000. Hoyr nærri um teir bíligu ferðaseðlarnar frá Maersk Air á tíni ferðaskrivstovu...

**Føroyar - Danmark**
**(Keypmannahavn ella Billund)**
**og aftur 2)**

Fyri hvønn
**1250,-**
+ ferðaavgjøld

**Børn 0-2 ár: -90% og 2-11 ár: -50%**

*2) Ferðaseðlarnir skulu bíleggjast minst 7 dagar frammanundan. Broyting av bílegging kann ikki gerast. Ferðaseðilin kann ikki endurrindast. Ferðin skal vara millum 7 og 21 dagar. Ferðaavgjaldið til Keypmannahavnar og aftur er 335,- kr. og til Billund og aftur 378,- kr. fyri hvønn. EuroBonus.*

MAERSK AIR